


62°N

# Lærlingur til 62ºN

## Sóknast verður eftir einum LÆRLINGI til ferðaskrivstovu okkara í Tórshavn at byrja 1. september 2010

**Uppgávurnar fevna m.a. um:**
- avgreiðslu av flogferðaseðlum
- hotel-, bil- og tok bíleggingar í samband við ferðina
- charter bíleggingar
- avgreiðslu av pakka- og bólkaferðum
- fyrifallandi uppgávur í avgreiðsluni

**Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin:**
- er fjølkøn/ur
- er opin og hevur lætt við at samskifta
- klárar at hava nógvar bóltar í luftini samstundis
- góðan málkunnleika til føroyskt, norðurlendskt og enskt
- Hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- hevur lokið HH-prógv, Studentsprógv ella líknandi miðnámsútbúgving

Talan er um eitt lærupláss, sum er ásett til fulla tíð. Lærlingalønin verður ásett smb. sáttmála við avvarandi fakfelag. Afturat lønini verður knýtt ein eftirlønarskipan.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bergur Thomsen á tel. 23 35 95 ella á bergur@62n.fo

Umsóknir skulu sendast til:
62°N, Boks 3225, 110 Tórshavn
ella við teldupost á bergur@62n.fo

Umsóknarfreistin er mánadagin
2. august 2010 kl. 16.00

62ºN er ein meira enn 45 ára gomul fyritøka við yvir 50 ársverkum. Virksemið hjá 62ºN fevnir um gistingarhús, ferðaskrivstovur, brennievni til flogfør, catering, kafeteria, incoming og bilútleigan. Felagsnevnarin fyri alt virksemið er tænasta, og 62ºN er ein tænastufyritøka, sum setir kundan í miðdepulin.